**Skal ikki almannakunngerast ella býtast út í USA, Kanada, Avstralia ella Japan**



# BAKKAFROST Á OSLO BØRS

## ALMENN ÚTBJÓÐING AV PARTABRØVUM Í TÍÐARSKEIÐNUM 8. MARS TIL 23. MARS 2010

### Tín møguleiki at keypa partabrøv í Bakkafrost og luttaka í framhaldandi menningini av felagnum

Bakkafrost verður eftir ætlan skrásett á Oslo Børs 26. mars í ár.

Felagið klárar seg væl samanborið við altjóða alifeløg, tá talan er um rakstur, og liggur í løtuni á einum 10. plássi mált eftir framleiðslunøgd. Bakkafrost ætlar at halda fast í hesa støðu, og ætlar sær at vaksa, tá ið høvið býðst.

Flestu týðandi alifeløg í norðurlondum og einstøk útlendsk feløg eru skrásett á Oslo Børs. Nógvir greinarar meta við jøvnum millumbilum um avrik og útlit hjá feløgunum.

**Týðandi laksaframleiðari**
Bakkafrost varð við ársbyrjan 2010 lagt saman við Vestlax.

Samanløgdu feløgini framleiddu í fjør 31 túsund tons av kruvdum alifiski og seldu fyri eina knappa milliard krónur. Úrslitið fyri skatt var 201 mió. kr, og eginognin var 573 mió. kr.

Laksurin verður allur útfluttur, antin feskur, ísaður ella sum lidnar frystar porsjónir. Framleiðsluorkan er 45.000 tons í rundari vekt, íroknað tvey nýggj økir.

Bakkafrost hevur aliloyvir á 15 støðum, fimm smoltstøðir og tvey sláturvirkir. Í dag starvast 514 starvsfólk hjá Bakkafrost.

**Visión**
Bakkafrost vil umvegis langtíðar samstarvssambond bjóða kundunum virðisøkta og heilsugóða dygdarmatvøru. Bakkafrost ynskir at grunda sína framleiðslu á burðardygga matvøru og tilfeingi.

**Strategi**
Málið hjá Bakkafrost er at vera eitt óheft felag, ið tryggjar ein langtíðar og varandi vøkstur í gjøgnum eina effektiva og lágkostnaðar framleiðslu.

Royndir vísa, at lívfrøðin hevur stóran týdning í framleiðlsuni av alilaksi. Bakkafrost leggur tí alla orku í at fremja eitt so sunt lívfrøðiligt vakstrarumhvørvi sum gjørligt.

**Útboðið**
Boðin verða út í mesta lagi 22,4 milliónir og í minsta lagi 18,4 milliónir partabrøv fyri ein sølukurs millum 27 og 31 norskar krónur báðar upphæddir íroknaðar. Sølan er skipað sum (i) eitt alment útboð í Føroyum og Noregi og (ii) eitt altjóða útboð til stovnsligar íleggjarar. Av samlaðu útboðnu partabrøvunum eru nýggj partabrøv fyri 75 mió. kr. Restin er søla hjá nøkrum av verandi partaeigarum. Umleið 44% av verandi partabrøvum verða sett til sølu.

**Úrtøkan frá útboðnum**
Seljandi partaeigararnir fáa úrtøkuna av søluni av sínum partabrøvum. Felagið fær úrtøkuna av søluni av nýggju partabrøvunum.

**Sølutíðarskeiðið**
Sølutíðarskeiðið byrjar 8. mars kl. 08.00 og endar væntandi 23. mars kl. 13.00 fyri minni íleggjarar og kl. 16.30 fyri stovnsligar íleggjarar. Handilin við partabrøvunum byrjar væntandi 26. mars á Oslo Børs við frámerkinum BAKKA.

**Tillutan og minking**
Um eftirspurningurin eftir partabrøvum er hægri enn talið av partabrøvum, ið eru til sølu, kunnu móttikin boð verða skerd í tillutanini. Føroyingar, ið tekna seg fyri partabrøv í almenna útboðnum fyri minni íleggjarar, kunnu fáa framíhjárætt. Minsta keyp er 500 stk. partabrøv.

**Prospekt**
Eitt prospekt, dagfest 5. mars 2010, ið er almannakunngjørt í samband við útboðið, kann saman við einum boðsseðili takast niður frá www.bakkafrost.com ella www.foroya.fo ella umbiðast frá einum av føroysku sølustøðunum, ið eru Føroya Banki, Eik Banki, Norðoya Sparikassi og Suðuroya Sparikassi.

**Gev gætur:** Henda lýsing er einans til marknaðarføring. Allar íløgur í útbjóðað partabrøv skulu verða grundaðar á prospektið hjá felagnum, dagfest 5. mars 2010. Henda lýsing er ikki send út í USA, og má ikki býtast út til persónar í USA (sum lýst í Regulation S í U.S. Securities Act frá 1933 ('Securities Act') ella brúkast í útgávum, ið vanliga koma út í USA. Henda lýsing er ikki eitt tilboð ella ein innbjóðing at keypa virðisbrøv í USA. Partabrøvini í P/f Bakkabrøv eru og verða ikki skrásett undir Securities Act, og mugu ikki verða boðin út, seld, ella handaði í USA ella til persónar úr USA, uttan so at handilin er undantikin frá ella ikki umfataður av skrásetingarkrøvunum í US Securities Act, Stabilization/FSA.

www.sansir.fo

Bakkavegur 9 · FO-625 Glyvrar · Faroe Islands · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09
bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968